# Tað ódemokratis

**Demokratiskt valdir politikarar kunnu saktans taka ódemokratiskar avgerðir. Og tað ger demokratiið til eina sárbæra skipan, sum altíð rúmar møguleikan fyri at glíða yvir í tað mótsatta. Tí stendur slagið um tað sanna demokratiið hvønn tann einasta dag og er ikki nakað, sum vit bert kunnu avgreiða í einum anonymum kliva fjórða hvørt ár. Tað segði Heini í Skorini, blaðmaður og lesandi, undir tiltaki Javnaðarfloksins í Grasagarði tann 1. mei. Niðanfyri prenta vit røðuna**



## 1.mai-røða



**Heini í Skorini**

heini_skorini@yahoo.com

Hvussu varðveita vit tey demokratisku virðini?

Hetta var spurningurin, eg fekk í telefonhorninum, tá eg varð biðin um at halda eina røðu tann 1. mei. Ja, hvussu varðveita vit tey demokratisku virðini? Og hvørji eru hesi sonevndu demokratisku virðini? Sum eg hugsaði um henda spurning, gjørdist tað mær greitt, at eg fyrst mátti finna fram til, hvat vit í roynd og veru meina við, tá vit tosa um demokrati. Hetta hugtak, sum sá dagsins ljós í býstatunum í gamla Grikkalandi, og sum í dag – 2500 ár seinni – verður so nógv nýtt og misnýtt í almenna kjakinum, at tað eftirhondini er vorðið eitt innantómt og útvatnað hugtak.

Øll eru nevniliga demokratar í dag og vilja verja tey flottu og hábærsligu demokratisku virðini. Og líkamikið hvat politiskt sjónarmið verður lagt á borðið, kann tað altíð gerast í fólkaræðisins navni. So áðrenn vit kunnu svara, hvussu vit varðveita tey demokratisku virðini, mugu vit fyrst finna útav, hvat demokrati er fyri nakað.

### Tá meirilutin ræður

Tann mest spontana og útbreidda definitiónin er, at demokrati er ein stýrisháttur, har meirilutin ræður og sleppur fjórða hvørt ár at avgera, hvør skal hava politiska valdið komandi fýra árini. Og tey, sum tá verða sett at stýra landinum, og tær avgerðirnar, sum tá verða tiknar, kunnu ongantíð vera annað enn demokratiskar. Tað eru jú fólkavald umboð, ið taka avgerðirnar. Tey demokratisku virðini eru í hesum ljósi virðir meirilutans.

Men henda demokratifatanin er samstundis eisini tann mest óumhugsaða. Einki er meiri vandamikið enn at uppfata demokratiið einans sum viljan hjá meirilutanum. Hesin avmarkaði og snæðurskygdi hugsunarhátturin hevur elvt til mangar ræðuleikar gjøgnum søguna. Tí henda demokratifatan hevur eitt blint álit á, at meirilutin altíð tekur tær bestu og rættastu avgerðirnar. Og hvat merkir tað? Jú, tað merkir, at um 51 prosent av Føroya fólki í morgin verða samd um at avtaka demokratiið, ja, so gera tey tað.

Demokratiið er nevniliga tann einasta samfelagsskipanin, sum kann avtakast við demokratiskum midlum. Og tað er tað, sum ger demokratiið til eina sárbæra skipan. Tað rúmar altíð møguleikan fyri at sláa yvir í tað mótsatta. Tað livir altíð við vandanum um at upploysa seg sjálvt. Tað var tað, sum hendi í Týsklandi í 30´unum, tá meirilutin atkvøddi Hitler til valdið. Tað var tað, sum hendi í Eksjugoslavia í 90´unum, tá Slobodan Milosevic varð valdur og byrjaði sína etnisku útreinsan. Tað er tað, sum hendir í Russlandi í dag, har Putin-stjórnin er í ferð við at avtaka pressufrælsið, skrivi- og talufrælsið og hevur likviderað fleiri stjórnarkritikarar. Og tað er tað, sum hendir í fleiri muslimskum londum, har fólkið atkvøður antidemokratiskar islamistar til valdið.

Soleiðis kann meirilutin atkvøða fólk til valdið, sum gjøgnum eina demokratiska prosess avtaka demokratiið. Og hetta lýsir, hvussu demokrati kann glíða yvir í fleirtalstyranni. Hvussu hárfínt markið er millum demokrati og despoti. Og hvussu stór misskiljing tað er, at demokratiið hevur sigrað, tá vit hava givið okkara atkvøðu fjórða hvørt ár og annars lata politisku valdsharrarnir stýra, sum teimum lystir.

Tað var hetta, sum fekk Roskilde-biskuppin Jan Lindhardt til at siga, at "demokrati er i sig selv hverken en god eller dårlig styreform; det kommer alt an på, hvad man stemmer sig til.

### "Demos" er alt fólkið

Tí kunnu demokratiskt valdar stjórnir eisini taka ódemokratiskar avgerðir. Tí kann demokratiið vera ódemokratiskt. Og tí verður slagið um demokratiið vunnið ella tapt hvønn tann einasta dag og er ikki nakað, sum vit bara kunnu avgreiða í einum anonymum kliva fjórða hvørt ár.

Demokrati er meirilutans

*Einki er meiri vandamikið enn at uppfata demokratiið einans sum viljan hjá meirilutanum.*
*Henda demokratifatanin hevur elvt til mangar ræðuleikar gjøgnum søguna*

*Vit kunnu demokratisera politisku skipanina, so galið vit vilja. Men tað nyttar einki, um vit ikki demokratisera menniskjuni í hesum sama samfelagi*

Sosialurin